VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Fleyr til gul av ymsum ættum og sólglottar, men eisini okkurt ælið, partvís kavi. Hitin millum 1 og 5 stig. Seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av landsynningi og um kvøldið regn. Lýggjari.



Veðrið hósdagin:
Lot til andøvsgul av vestri ella av ymsum ættum og ælingur, men um kvøldið yvirhøvu turt. Hitin millum 5 og 8 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Lot til andøvsgul av vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin upp í hvassan vind millum landnyrðing og landsynning. Sunnudagin minni vindur av av útnyrðingi. Sólglottar, men eisini ælingur – sunnunáttina møguliga kavaælingur. Hitin millum 2 og 6 stig.

Súlubøkur læra børn at lesa

SKÚLABØKUR
Tíðindaskriv

Nýggjar Súlu-bøkur, sum júst eru komnar á marknaðin, geva børnum møguleika at læra at lesa longu, tá tey duga nakrar fáar bókstavir. Smáu lesibøkurnar hoyra til bókstava- og ljóðbókina, Súlan, sum byggir á gransking um innlæring og er eitt týdningarmikið amboð í fyrstu lesi-innlæringini.

Tey seinastu árini hevur nógv kjak verið um lesiførleikar hjá børnum. Skrivligt samskifti er í dag so umfatandi, at øll børn mugu læra væl og virðiliga at lesa. Fyri at møta tørvinum á dygdargóðum arbeiðsamboðum til hesa uppgávu, hava lærararnir, Gunvør Højgaard og Osvald Jacobsen, skrivað bókstava- og ljóðbókina, Súlan.

Høvuðsbókin, Súlan, kom á marknaðin seinasta heyst og hevur fingið góða móttøku. Rithøvundarnir hava hildið fleiri væl-vitjað skeið, og eftirmetingin hevur verið framúr góð. Og nú eru fyrstu lesibøkurnar til Súluna útkomnar. Bøkurnar eita Sólin sá lás í á og Sólin sá ís í á.

Lesibøkurnar eru ætlaðar næmingum at lesa, so hvørt, sum teir hava lært teir ávísu bókstavirnar. Fyrstu bøkurnar hava løtt og ljóðrøtt orð, sum saman við myndum, geva barninum stuðul og mót til lesingina. Eftir ætlan koma seks smáar lesibøkur til Súluna út hetta skúlaárið.

Myndirnar í bókini siga eina søgu, sum prátast kann um. Í tekstinum eru nógvar endurtøkur, og samanlagt kann bókin við orðum og myndum geva næminginum eina góða uppliving av at hava lisið eina bók.

Hugsjónin handan Súluna er, at børn læra at lesa við at binda bókstav og ljóð saman. Gransking vísir, at okkara evni at vera varug við einstøku ljóðini í talumálinum eru avgerandi fyri lesilæringina. Kanningar í m.a. USA og Danmark hava staðfest, at tú sleppur ikki undan at arbeiða skipað við sambandinum millum bókstav og ljóð, um tú vilt náa einum neyvum lesiførleika.

Saman við nágreiniligu lærarabókini, spæl- og sangfløguni, teldutøku orðaspølunum og putlisøgunum á netinum og nýggju smáu lesibókunum er bókstava- og ljóðbókin Súlan ein góð heildarloysn til ta fyrstu lesi-innlæringina.

Súlan fevnir fyribils um hesar undirvísingarmiðlar:
Bókstava- og ljóðbókin Súlan
Lærarabók
Fløga við teldutøkum undirvísingarparti
Avritssíður (á www.fsg.fo)
Tvær smáar lesibøkur (fleiri koma)



Súlubøkurnar eru uppruna føroyskar, Osvald Jacobsen hevur teknað og Gunvør Højgaard hevur skrivað. Hannis Egholm hevur greitt til prentingar, og bøkurnar eru prentaðar hjá Føroyaprent. Bøkurnar eru 19 síður og kostar 68 kr. hvør.

Kelda: www.fsg.fo

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-9
Nuuk	-3
Qaqortoq	-3
Ammassalik	1
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	4
Seyðisfjørður	4
Tórshavn	6
Lerwick	4
Aberdeen	7
London	--
Tromsø	--
Bergen	8
Oslo	--
Stokkhólm	8
Keypmannah.	10
Helsinki	9
Moskva	5
Berlin	14
Warzawa	13
Kiev	4
Bukarest	5
Paris	12
Madrid	13
Róm	18
Malorca	19
Athen	--
Malta	16
Tunis	21
Beijing	9
New Dehli	27
Bangkok	30
Jakarta	31
Sydney	--
New York	10
Miami	23
Los Angeles	16
Meksikobýur	--
Panama	--
La Paz	15
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	25

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágrýst, 981 hPa. yvir Skotlandi fer eystureftir og dregur kalda luft av norði móti Føroyum.



Í dag:
Millum eitt hátrýst við Eysturgrønland og lágtrýstið yvir Norðsjónum rekur eitt skifti køld luft av norði móti Føroyum.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 10/11 kl. 06⁰⁰ – 11/11 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,9°
Minsti hiti máldur í november: -4,0° - Mesti hiti máldur í november: 12,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 2,0 mm – mált frá 10/11 kl. 06⁰⁰ – 11/11 06⁰⁰.
Avfallið higartil í november: 2 mm

Alt um harmonikur

www.simme.eu

VESTFALLSKYRRINDI

13. november Fullmáni
14. november Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svinoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svinoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
11. nov	4:20	16:43	3:20	15:43	3:35	15:58	6:20	18:43	7:20	19:43	2:35	14:58	1:35	13:58	4:35	16:58	5:35	17:58	4:05	16:28	5:20	17:43
12. nov	5:06	17:32	4:06	16:32	4:21	16:47	7:06	19:32	8:06	20:32	3:21	15:47	2:21	14:47	5:21	17:47	6:21	18:47	4:51	17:17	6:06	18:32
13. nov	5:58	18:24	4:58	17:24	5:13	17:39	7:58	20:24	8:58	21:24	4:13	16:39	3:13	15:39	6:13	18:39	7:13	19:39	5:43	18:09	6:58	19:24
14. nov	6:48	19:19	5:48	18:19	6:03	18:34	8:48	21:19	9:48	22:19	5:03	17:34	4:03	16:34	7:03	19:34	8:03	20:34	6:33	19:04	7:48	20:19
15. nov	7:51	20:22	6:51	19:22	7:06	19:37	9:51	22:22	10:51	23:22	6:06	18:37	5:06	17:37	8:06	20:37	9:06	21:37	7:36	20:07	8:51	21:22